# Bølle Bob í føroyskum sangleiki

**Havnar Sjónleikarafelag er nú farið undir fyrstu fyrireikingarnar til ein nýggjan sangleik. Talan er um væl umtókta danska leikin um Bølle Bob, sum nú verður føroyskaður. Leikarar verða børn og ung, og komandi sunnudag skipar Sjónleikarafelagið fyri sokallaðari casting, har øll kunnu møta upp**



*Havnar Sjónleikarafelag fyrireikar í løtuni ein nýggjan sangleik, sum serliga er ætlaður børnum og ungum. Talan er um væl umtókta danska Bølle Bob, sum nú verður týddur til føroyskt*

SJÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Havnar Sjónleikarafelag er nú farið undir tær fyrstu fyrireikingarnar til ein nýggjan sangleik, sum skal verða framførdur á føroyskum av føroyskum børnum og ungum. Talan er um danska leikin um kúllin Bølle Bob, sum í løtuni verður tulkaður til føroyskt mál. Bølle Bob er ein ungur kúllur, sum býr í eini lítlari bygd. Leikurin sjálvur snýr seg um hesa bygdina og flokkin hjá Bølle Bob, og evnini leypa yvir vinarlag, smærri samanbrestingar og hetta at finna sítt pláss í samfelagnum. Hetta eru evni, sum tey flest øll ung kenna aftur, og leikurin hevur eisini verið sera væl umtóktur í Danmark.

Nú verður so møguleiki hjá føroyskum ungdómi at síggja og liva seg inn í leikin, sum á føroyskum ber heitið Kúlla Knút. Tað er Elin á Rógvi, sum leikstjórnar leikinum, og fyrstu fyrireikingarnar eru longu farnar í gongd.

### Casting í Sjónleikarahúsinum

Umleið 20 leikarar skulu verða við í leikinum, harav tey flestu eru børn og ung. Enn hevur Elin ikki funnið fram til allar leikararnar, og tí fer Havnar Sjónleikarafelag at skipa fyri eini sokallaðari casting komandi sunnudag.

Ein casting er at samanlíkna við eina roynd, har øll fáa møguleika fyri at royna seg sum sjónleikara. Hugt verður eftir tíni útstráling, og sjálvandi eisini tínum evnum til at leika fyri øðrum. Tá Kúlla Knút er ein sangleikur, er eisini neyðugt, at tú torir og dugir at syngja eitt sindur.

– Í Føroyum hevur ikki verið vanligt at nýta nakra casting til leikir og annað, sum verður framført. Í veruleikanum skuldu vit kanska nýtt hetta oftari, tí í eini casting fáa øll høvi til at royna seg, greiðir Elin á Rógvi frá.

Elin sigur víðari, at tey leita eftir ungum fólki millum 13 og 20 ár. Hetta eru tó bert miðal tøl, so um tú ert eitt sindur yngri ella eitt sindur eldri, so skulu tølini ikki halda tær aftur til at royna tína eydnu á castingini.

Tá allir leikararnir eru funnir, verður farið undir venjingarnar.

– Um ætlanin heldur, so verður fyrsta venjingin tann 18. august, og einaferð í oktobur mánaða hava vit so fyrstu framførsluna, sigur Elin.

Castingin verður í Sjónleikarahúsinum sunnudagin klokkan 14.00, og eru øll vælkomin at støkka inn á gólvið til eina roynd.

– Tað hevur einki at siga, um tú ikki hevur roynt at staðið á palli fyrr. Um tú hevur hug, so ert tú vælkomin, sigur Elin og leggur afturat, at um onkur hevur onkran spurning, so eru tey vælkomin at ringja til hennara á 22 09 96.

### Kúllurin Kúlla Knút

Leikurin snýr seg um unglingan Kúlla Knút, sum býr í eini lítlari bygd. Í bygdini eru, umframt flokkin hjá Kúlla Knúti, ein handilsmaður, ein blaðmaður, ein lærarinna og til seinast ein maður, sum býr á einum tyrvingarplássi.

Kúlla Knút er eitt sindur kúllasligur, sum navnið jú eisini sigur, og hann stýrir tí mesta í flokki hansara. Umframt Kúlla Knút er sjálvandi eisini ein vøkur genta í flokkinum, eins væl og vit koma at síggja okkurt til friðarligu gentuna og tann sonevnda nørdin. Onkur nýggur kemur eisini í flokkin, men hvussu tað spælir av, ja, tað koma vit at síggja í leikinum.

Saman við flokkinum og restini av bygdini kemur Kúlla Knút út fyri nógvum áhugaverdum, og evnini í leikinum spenna seg eisini víða.

– Sum heild kann ein siga, at evnini eru tílík, sum ung allastaðni kenna seg aftur í. Millum annað hetta at góðtaka seg sjálvan og finna sítt pláss, sigur Elin á Rógvi.

Men eisini evni sum samanhald, vinarlag og smærri samanbrestir verða umrødd í leikinum um Kúlla Knút.

– Sum í flest øðrum sangleikum, so stinga evnini ikki so djúpt. Talan er heldur um undirhald, sum verður framført á ein øðrvísi hátt, heldur Elin.

Saman við leikarunum verða eisini fleiri góðir tónleikarar á pallinum, og saman skuldu tey givið ein undirhaldandi sjónleik, sum er kryddaður við góðum sangi og tónleiki.

### Fyrstu ferð leikstjóri

Hetta er fyrstu ferð, at Elin á Rógvi skal leikstjórna einum leiki einsamøll. Hon hevur tó drúgvar royndir av at standa á palli, bæði í vanligum sjónleiki og eisini sangeleiki. Til dagligt er hon búsitandi í Odense, har hon arbeiðir og eisini fæst nógv við sjónleik.

Tó verður hon stødd í Føroyum, til sangleikurin um Kúlla Knút hevur verið framførdur seinastu ferð.

Sjálv er hon sera spent til at fara undir sín fyrsta sangleik sum leikstjóri.

– Hetta verður uttan iva spennandi, og eg gleði meg til castingina, tá eg fái høvi til at síggja øll hesi ungu, sum hava hug til at verða við í leikinum, greiðir hon frá.

Upprunaliga er leikurin um Bølle Bob skrivaður av Gert Gertsen, sum bæði hevur skrivað tekstin og tónleikin.

Í Danmark hevur leikurin verið sera væl móttikin, og er hann bæði útgivin á fløgu og hevur eisini verið vístur sum sjónvarpssrøð.

Nú verður so høvi hjá øll teimum ungu, sum ganga við einum sjónleikara í búkin, at royna seg til casting til Kúlla Knút. Og um tú ikki hevur hug til at standa á palli sjálvur, so kanst tú jú altíð fara at hyggja at, meðan onnur fara at syngja og spæla í leikinum um Kúlla Knút.

# Býtið partabrøv í Føroya Banka út til allar føroyingar

**Undir viðgerðini av løgmansrøðuni skjeyt Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins upp, at allir føroyingar fáa 1000 krónur í partapeningi í Føroya Banka sum gávu um árið í fimm ár. – Hetta er eitt rímuligt endurgjald til føroyingar fyri bankabjargingina, heldur Jóannes Eidesgaard**



*At geva hvørjum føroyingi 5000 krónur í partapeningi í Føroya Banka heldur Jóannes Eidesgaard verða eitt rímuligt endurgjald fyri bankabjargingina*

PRIVATISERING
*Eirikur Lindenskov*

Javnaðarflokkurin er vanliga ikki serliga heitur fyri privatiseringum. Men undir viðgerðini av løgmansrøðuni skjeyt Jóannes Eidesgaard upp, at allir føroyingar skulu fáa lut í partapeninginum í Føroya Banka, nú alt bendir á, at hann verður privatiseraður.

Jóannes Eidesgaard skjeyt upp, at allir føroyingar fáa tillutaðar 1000 krónur í partapeningi í Føroya Banka.

– Hetta svarar til á leið 50 mió. kr. Allir føroyingar merkir allir føroyingar uttan mun til aldur, men teir skulu hava fastan bústað her. Annað árið verða so næstu 1000 kr.til hvønn føroying tillutaðar. Hetta verður gjørt í fimm ár, soleiðis at hvør føroyingar tá eigur partabrøv áljóðandi 5.000 kr., og samlað svarar tað til 250 mió. kr. av partapeninginum í Føroya Banka ella á leið 25%.

Um tvey ár verður farið undir at selja 45% av partapeninginum í Føroya Banka í fríari sølu, og her er so virðisbrævamarknaðurin eitt upplagt høvi at brúka, heldur formaður Javnaðarfloksins.

– Seld verða bert 5% pr. ár í 9 fylgjandi ár. Her eigur so ein avmarking at verða løgd, soleiðis at eingin einstakur íleggjari fær ávirkan fyri meira enn 5%, heldur hann.

Seinastu 30% av partapeninginum verða framhaldandi ogn landsins.

– Hetta ger so, at um øll tann fría sølan skuldi farið á útlendskar hendur, so verða 55% føroyskar.

Jóannes Eidesgaard heldur, at tað at geva øllum føroyingum henda møguleika vil verða eitt rímiligt endurgjald fyri sjálva bankabjargingina, har vanligi skattgjaldarin sat eftir við rokningini. Hetta hevði somuleiðis verið ein lætti til nógvar familjur, sum mistu undir kreppuni ella sótu trongt í tí. Hann hevur eisini eitt hugsað dømi:

– Ein familja við trimum børnum hevði fingið tillutað 5 x 5.000 kr. ella 25.000 kr. Eftir eina tíð hevði so sama familja kunna selt hesi partabrøvini við vónandi stórum viningi ella móttikið vinningsbýti hvørt ár. Hetta hevði so eisini givið bankanum møguleika til eina veruliga fólksliga forankring. Men fyrst og fremst ein viðurkenning av teimum tøkum, føroyingar tóku undir kreppuni. Javnaðarflokkurin metir uppskotið rímiligt og eitt veruligt sosialpolitiskt frambrot."

Undir viðgerðini á tingi kom fram, at bæði Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin kunnu taka undir við uppskotinum.



# 24.361 mannfólk og 22.635 konufólk

**Við árslok búðu 46.996 fólk í Føroyum. Harav eru 24.361 mannfólk og 22.635 konufólk. Vøksturin í mun til 2000 er 1,7%**



*Tað er vorðið liviligari í Føroyum seinastu árini, og hetta sæst eisini aftur í fólkatalinum. Fólkatalið veksur støðugt, men fólk eru ikki eins røsk at fáa børn sum áður.*

HAGTØL
*Heri á Rógvi*

Nýggjasta bókin í røðini við heitinum árbók fyri Føroyar er komin út á gøtuna.

Tað er Føroya Skúlabókagrunnur, sum gevur út í samstarvi við Hagstovuni.

–Árbókin, sum er almenna hagtalsverkið fyri Føroyar, er ein sera hent handbók hjá politikarum, fyrisiting, fakfelagsfólki v.m., stendur at lesa í tíðindaskrivi frá Skúlabókagrunninum.

Til skúlabrúks gevur Føroya Skúlabókagrunnur út frálærutilfar til árbókina. Talan er um 13 smærri hefti.

Burturúr árbókini kunnu vit m.a. lesa, at tað eru 40,5 tannlæknar í Føroyum.

Eisini kunnu vit lesa, at síðsta skúlaár gingu 7.598 børn í fólkaskúla í Føroyum.

Ingi Joensen hevur gjørt permuna, og Hestprent hevur umbrotið og prentað. Bókin er 410 blaðsíður og kostar 150 krónur.

### Maður og kona

Við árslok búðu í Føroyum 46.996 fólk í Føroyum, stendur at lesa í árbókini fyri Føroyar 2002. Harav eru 24.361 mannfólk og 22.635 konufólk. Kreppuárini fyrst í hálvfemsunum merktu nógv fólkatalið, men tað er av álvara vent í holuni.

Síðani 1999 er fólkatali voksið við 1.497 fólkum. Bara frá árslok 2000 til árslok 2001 vaks fólkatalið við 800 fólkum ella 1,7%.

Við árslok vóru tað 4.059 fólk ella 8,6 prosent av fólkatalinum í aldrinum frá 10 til 14 ár. Hinvegin vóru »bert« 218 fólk ella 0,5 prosent av samalaða fólkatalinum eldri enn hálvfems ár. Talið av teimum eldri enn seksti eru síðani 1999 voksið við 295. Tosað hevur verið um, at talið av pensjónistum fer at veksa munandi næstu árini, og hetta vil merkja eitt økt útreiðsla til pensjónir. Vøksturin síðani 1999 svara til 3,7%.

Vøksturin í fólkatali er komin øllum økjum í landinum til góðar. Tó ikki Klaksvíkarøkið, sum merkti ein lítlan negativan vøkstur.

Vágoyggin átti í prosentum størsta vøksturin áljóðandi 3,3%. Tórshavnarøkið hevði í tali ein vøkstur í fólkatali áljóðandi 323 fólk í 2001.

Stuttligt er at leggja til merkist, at í Føroyum eru 9.149 giftir menn, men bert 9.099 giftar kvinnur. 52,7 prosent av Føroya fólki livdu við árslok í tí frælsi at vera ógift ella single, sum tað eisini kann eita. Afturat hesum eru 8.5%, sum skild ella einkjufólk.

853 fólk, ið við árslok 2001 vóru búsitandi í Føroyum, høvdu aðra ríkisborgarastøðu enn danska. 178 íslendingar, 95 úr Noreg, 74 pólendingar, 73 bretar og 37 teilendingar teljast millum teir mongu útlendingarnar, sum búleikaðust í Føroyum 31. desember 2001. Eisini vóru 31 serbar, 27 amerikanarar og 8 úr Avstralia vóru íbúgvarnar í Føroyum seinasta árið.

### Fleiri børn

Í 2001 vórðu 631 børn fødd á lívi í Føroyum. Hetta eru 67 færri enn árið fyri. Somuleiðis er burðaravlopið, t.e. talið av føddum minus deyð, eisini minkað - frá 347 í 2000 til 270 í 2001.

Tað vísir seg at vera í Tórshavn og Eysturoynni, at tey serliga eiga nógv børn.

133 børn vórðu fødd í Eysturoynni, og burðaravlopið var 61. 272 børn vórðu fødd í Tórshavnarøkinum. Minus tey deyðu kemur hetta eitt burðaravlop áljóðandi 159.

# Rebekka og Jákup vanligast

**Møguleikin fyri at renna teg í Rebekku ella Jákup Jacobsen á føðideildini seinasta ár var ógvuliga stórur**



*Hvussu skal barnið eita? Í 2001 var tað helst Rebekka og Jákup*

HAGTØL
*Heri á Rógvi*

Tað vórðu 631 børn fødd í Føroyum í 2001. Hesi góðu børn skulu eisini kallast fyri okkurt, og foreldrini hava funnið fram til nøkur spennandi nøvn.

Hægsti mótið í 2001 var at kalla dóttrina Rebekku og sonin Jákup. Tá mest nýtti eftirnavnið í fjør var Jacobsen, so kundi tú eisini rokna við at hitta lítlu Rebekku Jacobsen ella lítla Jákup Jacobsen á føðideildini, hóast hann ella hon kanska ikki hevði fingið navn enn.

Tað vóru átta nýggjar Rebekkur í Føroyum í 2001. Beint í hølunum á teimum koma sjey við navninum Helena og somuleiðis sjey við navninum Vár. Eisini kann tað nevnast, at eitt so norrønt navn sum Ronja aftur er komið til heiðurs og æru við seks nýggjum av slagnum í 2001.

Ert tú ein drongur føddur í 2001 og saknar tínar líkar, so er størsti kjansurin, um ert ein av teimum tíggju, sum eita Jákup. Tað er eisini toluligt lætt, um navnið er Hans ella Kristian, tí har eru nevniliga sjey av hvøjum slag. Eisini eitt navn sum Benjamin er væl umtókt. Seks Benjaminar komu í verðina síðsta ár.

Mest vanligu eftirnøvnini, ið nýføðingar í 2001 hava fingið, eru tey so kendu Jacobsen, Olsen og Hansen.

Í 1992 fingu vit eina nýggja navnalóggávu, har øll nýggj navnagevan skuldi fylgja einum navnalista. Hesin listin tykjast eisini fleiri at kaða niður í, tí at kalla øll nøvnini eru »góðkend« føroysk nøvn. Onkur vil so vera við, at nøvnini áður hava verið óvanlig og nú forboðið.

Annars eru Anna og Hans framvegis tey mest nýttu fornøvnini í Føroyum. 857 eita Anna, og 838 eita Hans. Hetta skyldast eisini, at hesi bæði nøvnini oftani verða nýtt í samansettum nøvnum.

Hyggja vit eftir bert tí eina einsamalla fornavninum, so er Katrin mest nýtti fornavni við 258 umboðum. Teir 334, ið kallast fyri John, mynda størsta partin av føroysku mannfólkunum við tí eina einsamalla fornavninum.

## Nýggjur aðalstjóri

Trivnaðar- og heilsumálastýrið fer í næstum at søkja eftir einum aðalstjóra. Orsøkin er tann, at fyrrverandi Almanna- og heilsumálastýið er býtt sundur í tvey ráð - trivnaðarmálaráðið og heilsumálaráðið. Higartil hevur bert verið tann eini aðalstjórin til bæði ráðini, men nú skal so ein finnast afturat.

Tað eru vanliga fólk við hægri útbúgving, ið gerast aðalstjórar. Lønin liggur um 43.000 krónur um mánaðin.

*-hr*